# Hvør skuldi gamla

**ELDRARØKT** "Hvør fuglur syngur við sínum nevi", sigur orðatakið. Og her við borðið á heiminum fyri tey minnisveiku er einki undantak: Ikki nóg mikið við tí, at øll syngja við sínum munni. Tey duga haraftrat sangirnar uttanat.

Orð: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Vallalíð í Havn seinnapartin mikudagin. Við borðið sita nøkur av tí eldra húsfólkinum, saman við starvsfólkunum. Tað er týðiligt at síggja, at tey aftur í dag hugna sær.

Á vældekkaða borðinum stendur bæði drekka og góður føroyskur viðskeri: Kjøtpylsa, rullupylsa, skerpikjøt og føroyskt breyð. Tey hava sitið her í einar tveir tímar, men eingin letur til at vilja fara frá borðinum.

Hví skuldu tey eisini tað, - her er jú so hugnaligt. Tí umframt tann góða viðskeran, liggur eisini eitt sanghefti á borðinum. Men tað er í stóran mun ikki neyðugt at brúka tað, og tað er heldur sjáldsamt tá ein hugsar um hvar ein er staddur.

Vit eru nevniliga á heiminum fyri minnisveik, har júst hetta er felagsnevnari teirra. Tey hava gloymt ein part av tí sum er rundan um tey, men nógv av tí farna er ikki farið í gloymskunnar bók.

Mitt ímillum hesar borgarar okkara, situr Jóhanna. Hon er heilsurøktari og tað er týðiligt at merkja og hoyra, at hon elskar sítt fak. Her við borðið leggur hon alla sína persónligheit í at vera um hesi gomlu og at geva teimum ta lívsgóðskuna, tey hava uppiborið.

Við útbúgving síni hevur hon fingið eitt innlit í støðuna hjá hesum gomlu. Og í góðum og tvørfakligum samstarvi við sjúkrarøktarfrøðingar, heilsuhjálparar, ítrivsvegleiðara, pedagogar, hjálparfólk, reingerðisfólk og so sanniliga eisini við húsavørðin, gera tey sítt til at húsfólkið hvørja løtu merkir, at Vallalíð er eitt heim. Teirra heim.

– Kom, nú stemma vit í, sigur Jóhanna, og tekur í hendurnar á teimum báðum kvinnunum, ið sita undir liðini á henni. - Niklas hjá Pena, hann kenna tit.

Og løtu seinni ljóðar sangurin við borðið.

## Vert at liva

Sum ein partur av tí skipaða gerandisdegnum hjá hesum minnisveiku íbúgvum okkara, er mikudagurin dagurin við borðhaldinum, hugnanum og sanginum.

Tá verða borðini dekkað so vakurt sum tað nú einaferð ber til. Tað fína stellið verður tikið fram. Teir litfagru serviettarnir verða lagdir við hvønn einasta borðisk, og vælsmakkandi viðskeri og køka sett á borðið.

Ein løta gongur, og sangheftið verður tikið fram. Hetta er ein løta sum dámar húsfólkinum og teimum vitjandi sum eru komin á gátt hesa løtuna.

– Hvønn sang skulu vit nú syngja?, vil Marjun, eitt annað av starvsfólkunum, vita.

Ein sangur ið man hóska væl til umstøðurnar og høvið er júst tann sangurin, ið onkur skjýtur upp: Hvør skuldi gamlar gøtur gloymt?

– Ja, hann er góður, kemur frá tað frá eini av tilkomnu kvinnunum við borðið. Og so verður stemmað í, hvør við síni rødd.

Eitt av húsfólkunum, ein maður ið situr nakað burtur frá borðinum, hevur hug at syngja við, men tað hoyrist ikki stórvegis frá honum. Tað er tó eingin ivi um, at hann eisini dugir orðini uttanat og kann taka undir við hvørjum einasta orði. "Fyri mangan góðan dag ið var". Jú, soleiðis hevur lívið verið, og soleiðis er lívið eisini í dag, nú felags adressa teirra er Vallalíð 12, 100 Tórshavn.

Nú eru teir góðu dagarnir farnir. Nú er upp til starvsfólkini at geva teimum lívsgóðsku, ein góðan gerandisdag og mótvirka einsemi, keðsemi og hjálparloysi.

Henda løtan við borðið mikudagin er eitt stig á leiðini. Her skal lívið vera vert at liva, og har skal tann einstaki verður hoyrdur og sæddur og virdur.

snorri@sosialurin.fo





**HÚSDJÓR TIL HÚSFÓLKIÐ**

*Ein partur av víttfevnda virkseminum í heiminum í Vallalíð eru húsdjórini. Tað er ikki á hvørjum heimi, at húsfólkini kunnu ganga millum hund og kettu, - og tað er heldur ikki á hvørjum heimi, at ein fær vitjan bæði av dunnuunga og høsnarunga. Hetta sær út til at dáma eldru væl*



**VATN**

*Ein av monnunum hevur sum sína føstu uppgávu at vatna plantur og urtapottar í hugnaliga garðinum. Hetta kemur helst væl við, nú gróður er í luftini*




**SANGUR**

*Teir góðu gomlu sangirnir verða ofta tiknir fram, tá mikudagshugnin er á skránni. Tað er ikki frítt, at teim eldru dámar hetta sera væl og syngja við av heilum huga. At ein so kann vagga í takt við sangin, ger bert upplivingina enn størri*